# dan almenna ljósinum



tá hann flytir til Danmarkar í 1980.

– Eg royndist ongantíð serliga væl sum málverji. Tað er helst tí, at B68 flutti upp í bestu deildina, tá eg flutti niður til Danmarkar, letur skemtandi í honum.

**Ikki skil fyri fótbólti**

Christian F. Andreasen roynir í heilum at flyta fokus. Hann tykist ikki hava stórvegis áhuga at práta um seg sjálvan. Hann ger stundum eina roynd at førka prátið inn á lívið sum sakførari í Føroyum og Fótbóltssambandið.

Nú ger hann aftur eina roynd. Hann hevur gjørt enda á appelsin-sodavatnini, og stendur nú uppi og fortelur um avbjóðingina sum forseti í FSF. Men soleiðis skal Christian F. Andreasen helst eisini lýsast. Sum ein maður í andglettinum, tí hann noyðist.

Hann ger greitt, at spæliskipanir, rennimynstur og innarasíðu ella uttarasíðu avleveringar ikki siga honum so nógv. Tað eru kappingarreglarnar, lógirnar og organisatiónin í fótbóltsspælinum, sum hava hansara áhuga.

Men hvør verður so tín leiklutur sum FSF-forseti?

– Eg vil fyrst og fremst, at samstarvið millum feløgini og Fótbóltssambandið verður varðveitt og helst styrkt. Tí øll mugu verða við til at skapa úrslitini. Kærumál og trætur hoyra ikki heima í nevndararbeiðinum eftir mínum tykki, og tí fær umsitingin og Aganevndin uppgávurnar at loysa slíkar trupulleikar. Ein nevnd skal seta karmarnar, men ikki umsita. Eg fari at standa á odda fyri einari professionellari og uttanveltaðari nevnd, sum vil føroyskum fótbólti tað besta, sigur Christian F. Andreasen.

## FAKTA um forsetan

Navn: Christian F. Andreasen
Aldur: 50 ára gamal
Útbúgving: Cand. jur., Københavns Universitet 1985
Fótbóltssambandið: Nevndarlimur í FSF frá 1986 til 1990, og aftur frá 2002 til 2004. Hevur seinastu árini virkað sum ráðgevi hjá FSF